Savnast handan málið

12. maður er veruliga farin undir at fyrireika seg til landsliðheystið

JÁKUP MØRK

Sum vanligt er áskoðarabólkurin hjá landsliðnum, 12. maður, úti um seg, nú tað stundar til enn ein landsdyst hjá A-landsliði okkara í fótbólti.

Sita saman

Í skrivi til limir sínar boðar 12. maður frá, at teir hava fingið í lag avtalu við Tryggingarfelagið Føroyar, soleiðis at endatribunan verður staðið, har 12. maðurin savnast.

Júst endatribunan er aðrastaðni staðið, har fasti kjarnin av viðhaldsfólkum savnast, og í 12. manni vóna tey, at tey eisini komandi dystirnar hava møguleikan at savnast á einum stað, soleiðis at tey í felag kunnu díkja á okkara menn.

Fara til Sveits

Í skrivinum verður eisini sagt frá, at umframt at fyrireika seg til dystirnar móti dønum og slovenum, arbeiðir 12. maður eisini við at fyriskipa eina ferð til Sveits, har landsliðið skal spæla seinni í heyst.

Í skrivinum verður annars sagt, at orsakað av ófriðarligu støðuni í Jugoslavia, verður eingin flogferð gjørd tann vegin, tá føroyingar skulu royna seg har.

Í góðari tíð

Át enda verður boðað frá, at nú tað verður roknað við, at Tórsvøllu fer at vera á tremur til dystin móti dønum, heitur 12. maður á áskoðararnar at møta í góðari tíð, so til ber at tryggja sær sess við Tryggingartribununa.

Gekk væl hjá Pola í NM

Poli Joensen fekk tað besta úrslitið, tá ið tríggir føroyskir ríðarar vóru í Noregi og kappaðust í Norðurlanda-meistaraskapinum

STEFAN Í SKORINI

Besta úrslitið var í 100 metur speedpass, har Poli Joensen var nummar sjey, men hann var tó ikki langt frá einum heiðursmerkjaplássi. Føroyingarnir høvdu ætlað at røkka einum heiðursmerki í hesi greinini, men tað eydnaðist tíverri ikki hjá teimum. Ein av orsøkunum kann vera, at hesturin hjá Pola var vorðin heldur móður, eftir at hava verið við í fimm kappingum. Onkuntíð vóru tvær um dagin, og tað var heldur nógv móti endanum. Næstu ferð luttikið verður í altjóða kappingum, verður hetta havt í huga ikki at luttaka í ov nógvum greinum í senn.

Poli megnaði eisini at fáa eitt níggjunda pláss í 250 metur skeið, og tað er eisini eitt fínt úrslit. Í hinum greinunum gekst heldur verri hjá Pola. Í fimmgongd var hann í miðjuni, og í tølt var hann í aftara endanum, meðan í steelpass varð hann kolldømdur. Poli luttók í fimm kappingum, men hetta var kanska heldur nógv, av tí at hesturin møddist móti endanum.

Heri og Jóanis óhepnir

Hinir báðir føroyingarnir í Noregi vóru Heri Dahl og Jóanis í Hoygarðinum, men teimum gekst ikki eins væl og hjá Pola í NM kappingini.

Heri varð kolldømdur í tølt, men hann varð sera óheppin. Dómararnir valdu at kolldøma hann, tí hann gjørdi eina formleikavillu, eftir at hann hevði viljað havt síni egnu ross við sær, men ikki er loyvt at flyta ross millum londini. Føroysku ríðararnir ætlaðu sær betri úrslit, men tað gekk ikki hesuferð.

Túrurin var annars sera væl eydnaður, og føroysku ríðararnir hava lært nógv.

- Vit hava fingið nógv burturúr túrinum, og vit hava fingið at vita nøkur ting, sum vit ikki vistu áðrenn. Eisini er tað umráðandi fáa samband við tey røttu fólkini innan hesa ítróttargreinina, sigur Heri Dahl úr Noregi.

Føroysku ríðararnir koma heimaftur mikudagin.

Rógvi ikki við til FM

Rógvi Johansen fekk aftur um vikuskiftið góð úrslit í Danmark, men harmast samstundis um, at hann ikki fær verið við til FM kappingina í heyst

JÁKUP MØRK

Hetta vikuskifti var súkklukapping á Fyn, har koyrdir vórðu 172 km. býtt á 4 stórar og 4 smáar umgangir.

Rógvi var saman við einum 4-5 ørðum súkklarum farin avstað, men høvuðsfeltið megnaði kortini at fáa fatur aftur á teimu. Tað eydnaðist tó føroyska súkklaranum at stinga av enn einaferð, og seinni komu so 13 aðrir súkklarar upp til hann.

Sum kappingin leið eydnaðist tað teimum at økja um leiðsluna, men tá góðir 50 km vóru eftir á mál, varð leiðslan aftur minkað niður í eini 50 sekund.

Teir fingu tó aftur sett nakað meira av ferð á, og hóast tað kostaði nógva orku, fekst leiðslan aftur upp á 2 minuttir, greiðir Rógvi frá.

Kostaði

Nakrir av teimum súkklarum, sum høvdu verið við í útbrotinum, høvdu ikki tikið tær føringar, sum teir áttu at taka, men høvdu heldur spart seg til endaspurtin, og hetta merktist eisini, tá málið av álvara nærkaðist.

Tað eydnaðist fýra av hesum at sleppa leysir av restini, og kom Rógvi sostatt á mál í einum tíggju mans bólki. Sjálvur spurturin hevur ongantíð verið sterka síðan hjá Rógva, men tað eydnaðist honum so at halda nakra av súkklarunum aftan fyri seg, soleiðis at hann kom í mál sum nr. 10. Eitt úrslit, sum Rógvi hóast alt var nøgdur um, og sum aftur gav honum stig í besta danska bólkinum.

Komandi vikuskiftið skal Rógvi luttaka í tveimum kappingum. Leygardagin verður kappast í Skive, og sunndagin verður stóra kappingin, Fyn Rundt.

Ikki til FM

Annars harmast Rógvi um, at tað ikki er gjørligt hjá honum at luttaka í FM kappingini í ár. Hann vísir á, at tá kappingarnar liggja í august og september, hevur hann ikki møguleika at koma heim, og sum verandi meistari á bæði 30 og 100 km teinunum, er hann keddur um, at hann ikki fær verið við.

Hann vísir á, at alla aðra staðni verða heimligu meistarakappingarnar hildnar í juni, soleiðis at eisini teir súkklarar, sum eru staddir uttanlands, hava møguleika at vera við, men at soleiðis verður so ikki við FM kappingini í ár.

Hetta má metast at vera sera óheppið fyri kappingina, tí einki er at taka seg aftur í, at kappingin missir nakað av virði, tá fremsti súkklari okkara ikki er við. Eisini átti hetta at verið eggjandi hjá ungu súkklarunum, sum allir hava nakað at læra frá Rógva.

Ósvaraði spurningurin verður so eftir FM, um føroyameistarin eisini er Føroya besti súkklari.

Sum nevnt, so harmast Rógvi um, at hann ikki hevur møguleika at verja heitið, men figgjarliga verður hetta ein ov stórur biti hjá sær, heldur hann. Hann leggur tó afturat, at hansara vón er, at FM kappingin kortini verður ein bæði góð og heiðurlig kapping.

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari

BERGUR Á REYNATRØÐ

Børkuvegur, 620 Runavík

Tlf. 448480

Stongt vegna summarferiu til 21. aug.

MM gólv

Monrad Mouritsen - alt innan gólválegging

✆ 222824

Vinyl • Teppir • Linolium

Baðirúm • Vátrúm

DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

KVØLDSKRÁ Á HANDILSSKÚLANUM í Havn, heysthálvan 2000

INNSKRIVINGARSEÐIL

Ættarnavn:	Føðingardagur:	
Fornavn:	Starv/arbeiðspláss:	
Gøta:	Tel arbeiðspláss:	
Postnr./bygd býur:	Tel heima:	Teldupost adr.:

FHS-stakroyndir (setið kross)

Virkisbúskapur C	mikud. 18.00-20.30	☐
Kunningartøkni C	mánad. og mikud. 20.30-22.00	☐
Marknaðarførsla C Prøvtøkur í mars/apríl	mánad. 18.00-20.30	☐

HH-stakroyndir

Støddfrøði B-stigi (kravt til TSÚ og HD)	týsd. og hósd. 20.15-21.45	☐
Virkisbúskapur B-stigi Prøvtøka í mai.	týsd. og hósd. 20.15-21.45	☐

Merkonom

Leiðsla og samstarv mikud.	18.00-20.30	☐
Virkisfyriskipan	mánad. 18.00-20.30	☐
Virkisbúskapur	týsd. 18.00-20.30	☐
Marknaðarføringsplanlegging	mánad. 18.00-20.30	☐
Starvsfólkafyrisiting	týsd. 18.00-20.30	☐
Ársroknskapur	mánad. 18.00-20.30	☐
KT-í fyrisitingini	týsd. 18.00-20.30	☐
Keyp	hósd. 18.00-20.30	☐
Millumlanda distributión	mánad. 18.00-20.30	☐
Kreativar loysnir	týsd. 18.00-20.30	☐

Kostnaður:

Merkonom, luttøkugjald:	kr. 400,00 fyri hvørja lærugrein
FHS og HH stakroyndir:	kr. 300,00 innskrivingargjald
Depositum:	kr. 250,00 fyri hvønn persón-

FHS

Tey sum hava eina miðnámsútbúgving, t.d. studentsprógv kunnu fáa FHS prógv við at taka hesar lærugreinar:

- Virkisbúskapur C
- Marknaðarførsla C
- Kunningartøkni C

Ein vallærugrein, har valt verður millum Vinnulívsrætt C, Altjóðabúskap B. Virkisbúskap B, Marknaðarførslu B, Kunningartøkni B ella eina økislærugrein, sum í minsta lagi hevur 105 tímar.

Merkonom

Merkonom prøvtøkur verða í desember 2000 ella januar 2001, undantikin er Marknaðarføringsplanlegging, sum verður í mai 2001.
Allar merkonomlærugreinir hava tríggjar tímar um vikuna.
Á vári 2001 er ætlanin at bjóða hesar merkonomlærugreinir út:

- Grundlærugreinarnar
- Arbeiðsrætt
- Greining og fígging
- millumlanda vinnulívsrætt

Ætlanin er treytað av, hvørjar lærugreinar verða á heysti ár 2000.
Lýst verður nærri við hesum í desember ár 2000.

Vanligar fortreytir:
Útbúgving á handils- og skrivstovuøkinum. Hetta umfatar til dømis:
- Lærlingaútbúgving á handils- og skrivstovuøkinum
- FHS við vinnuroyndum í minst tvey ár
- HH við vinnuroyndum í minst eitt ár

Ella
- At umsøkjarin hevur aðra fakliga útbúgving

Ella
- At umsøkjarin heur relevantar vinnuroyndir í minst tvey ár, og skúlin metir hann at vera egnaðan.

Serligar fortreytir:
Í nøkrum merkonomlærugreinum eru umframt vanligu fortreytirnar eisini serligar fortreytir kravdar.

- Í Virkisbúskapi krevst kunnleiki til roknskap svarandi til 30 tíma undirvísing.
- Í Keypi krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prøvtøku í Virkisbúskapi ella HH.
- Í Ársroknskapi krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prøvtøku í Virkisbúskapi á merkonom ella hevur HH.
- Í Greining og fígging krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prøvtøku í Virkisbúskapi og Ársroknskapi.
- Í Marknaðarføringsplanlegging krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prøvtøku í Virkisbúskapi, Almennari marknaðarførslu, Marknaðargreining og -Strategi ella hevur HH.
- Í Millumlanda distributión krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til prøvtøku í Virkisbúskapi.

Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara

Freistin at tekna seg til kvøldskúlan er 9. august á r 2000. Skúlagongdin byrjar mánadagin 28. august 2000. Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku. Skúlin er stongdur vegna summarfrí frá 7. juli til 4. august.

undirskrift dagur

FØROYA HANDILSSKÚLI - Postrum 177 - 110 Tórshavn - Tel 317177 - Fax 313374

Leitið - 31 65 11

UNGA TJÓÐVELDIÐ

nógv mátið er grulvað, nú fara vit til gongu

UT-Ráðstevna

Ráðstevna verður á Føroya Fólkaháskúla 18.–19. august.

Á ráðstevnuni verður m.a. ein rød av fyrilestrum:

Høgni Hoydal: »Samráðingarnar um fullveldi – stórpolitikkur ella pressusjóð?«

Ingrid Jensen: »Trivnaður 2000«

Jonhard Eliasen: »Føroyski búskapurin og framtíðin – vandamál og møguleikar«.

Jacob Pauli Joensen: »Framtíðar umhvørvispolitikkur«

Torbjørn Jacobsen: »Ein gimsteinur í Norðurhøvum!«

Fullfíggjað skrá verður latin tá ráðstevnan byrjar fríggjakvøldið 18. august kl. 19.00.

Ráðstevnan er ókeypis.

Tilmelding á tlf. 322050 mikudagin og hósdagin kl. 16.00–18.00 ella á teldupost UT@leitel.fo áðrenn fríggjadagin.

Øll ung, ið hava áhuga í framtíðar støðu Føroya, eru vælkomin.

Unga Tjóðveldið

Skrivstovulærlingur søkist

Skúlin søkir eftir skrivstovulærlingi at byrja 1. sept. 2000 ella skjótast tilber.

Umsøkjarar, sum hava FHS ella HH prógv, hava fyrimun.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Marknagilsvegur 75 - P.O.B. 239
FO-110 Tórshavn

NÝGGJ KIROPRAKTOR OG AKUPUNKTUR KLINIKK

letur nú upp á Norðurstíggi 11 á Argjum og í Heilsumiðstøðini í Runavík. Viðtala fæst á tel. 32 02 12 ella 44 81 02.

Ári Rasmussen

Stoðtekn - 211620